# Allir húsvognar verða í Klaksvík

**CAMPING** Norðoya Kunningarstova má finna eyka pláss til campingvognar, sum skulu á Summar Festivalin. Roknað verður við, at 95 prosent av øllum campingvognum í Føroyum fara á festival um vikuskiftið



*Talið á húsvognum, sum hava biðið sær pláss í sambandi við Summar Festivalin er farið upp um 120*

Eirikur Lindenskov

Talið á húsvognum, sum fara á Summar Festival, hevur verið støðugt vaksandi seinastu árini, og aftur í ár flokkast húsvognarnir í Klaksvík. Norðoya Kunningarstova umsitir økið til húsvognarnar, sum er á útfyllingini innast á vágni í Klaksvík, og har hava tey havt úr at gera seinastu dagarnar.

Talið á húsvognum, sum hava biðið um pláss, er farið upp um 120, og nú má Norðoya Kunningarstova seta eyka pláss av til húsvognar.

Leiðarin av Kunningarstovuni í Klaksvík, Meiken Steinberg, roknar við, at 95 av øllum campingvognum, sum eru skrásettir í Føroyum, verða í Klaksvík um vikuskiftið.

*eirikur@sosialurin.fo*

# Stórur áhugi fyri at leiga húsvogn

**So stórur er áhugin fyri at fara at búgva í húsvogni á Summarfestivalinum, at umleið 50 fólk spurdu Magna Fles í Klaksvík um at leiga vogn. Hann hevði tó bara tríggjar at leiga út**

Randi Jacobsen

Summarfesivalurin er helst tann stevnan, sum nógvar familjur fara til, og hjá familjum riggar væl at búgva í húsvogni.

Nógv eiga húsvogn, men tað ber eisini til at leiga sær húsvogn.

Ein maður, sum leigar húsvognar út, er Magni Fles í Klaksvík.

Til flestu stevnurnar í landinum leigar hann sínar tríggjar vognar út, men tað hendir, at onkur verður standandi óleigaður eftir.

Men hevði hann átt fleiri vognar, kundi hann lættliga leigað allar út til Summarfestivalin.

- Í hvussu er 50 fólk hava ringt til mín seinastu mánaðirnar og spurt um at leiga húsvogn til Summarfestivalin, sigur Magni Fles.

Ofta hevur hann ikki allar tríggjar vognarnar at bjóða fram, tí tey somu, sum leiga frá honum eitt ár, biðja um at sleppa at leiga húsvogn aftur komandi ár.

Magni Fles metir, at tað eru umleið 150 húsvognar í landinum. Teir koma ikki allir á Summarfestivalin, men rúm hevði verið fyri næstan øllum á útfyllingini, har húsvognarnir hava fingið pláss á festivalinum.

Húsvognarnir standa tó ikki trongt, tí rúm skal eisini vera fyri bili og møguliga tjaldi eisini.

Annars eru nøkur pláss í Grøv til húsvognar.



# Heilsa ferðafólki við fýrverki

**Hvørja ferð Norrøna fer úr Føroyum, sendir Gullhornið vegna aðrar handlar eisini, upp fýrverk sum takk fyri vitjanina**

Randi Jacobsen

Fleiri fólk hava lagt til merkis, at hvørja einastu ferð Norrøna fer úr Føroyum, verður fýrverk sent upp. Um tað so er á degi ella á nátt.

– Tað er ikki Smyril Line, sum skipar fyri. Eitt skip hevur ikki loyvi til at senda fýrverk upp, sigur Svein í Heiðunum Á Smyril-Line.

Hann veit, at familja ofta er á bryggjuni heilsar eitt nú brúðarpørum, sum fara av landinum við Norrønu.

Men í flestu førum er tað Leif Erik Niclasen í Gullhorninum, sum sendir upp fýrverk við fráferðina hjá Norrønu.

– Eg geri tað vegna fleiri handlar, sum ein heilsan til ferðafólkini, ið hava vitjað. Fleiri okkara koma í samband við nógv vitjandi, og heilt nógv siga frá, hvussu væl tey hava verið móttikin. Teimum vilja vit fegin heilsa og biðja farvæl, sigur Leif Erik Niclasen.

*randi@sosialurin.fo*